# Minningarorð um Richard

Hin føroyingurin, sum fórst var Richard Jacobsen úr Sandvík. Vit greiddu eitt sindur frá honum í fyrru greinini. Í Dimmalætting vóru beint eftir vanlukkuna minningarorð um Richard, undirskrivað "bygdarmaður. Vit taka nøkur brot burtur úr:

"Richard var av fermastu unglingum. Av góðum bergi brotin. Pápin var hin kendi sandvíkingurin Jákup á Hólum. Mamman var Maria Sofía úr Geilagarðinum í Skúvoy.

Tað er eitt av skaldum okkara, sum tekur soleiðis til: "Vit spyrja so ofta, hví er tað so, at vanlagnan bert ber til summi boð, og hví er tað meg hon rámar?"

Hetta kann av sonnum sigast um Hólafólkið. Pápabeiggi Richards var giftur í Skúvoy, og gekk hann burtur har í best árum. Eitt systkinabarn hansara doyði við Florens í 1927, og eitt annað systkinabarn doyði við einum donskum báti undir seinna heimsbardaga. Ein beiggi hansara sló út undir Íslandi við Morning Star í 1930, og ein annar beiggi sló út við Godthaab, eisini undir Íslandi í 1936.

Sum so mangur annar av ungu landsmonnum okkara leitaði Richard sær burtur, tí so lítlir møguleikar eru her á landi. Hevði hann verið ein drumbur, so hevði hann kanska livað enn. Tó Harrin kennir alt. Men hann var framúr góður maður, og tessvegna hevði Grønlandshandilin boð eftir honum og setti hann til annan stýrimann á besta skipinum í felagnum. Tí skipinum sum sagt var um, at tað kundi ikki farast á sjógv, men Harrin man lagnuna ráða.

Samhugur okkara leitar til gomlu mammu hansara og til konuna og tær báðar smáu døturnar, sum enn ikki duga at skilja, hvat tær hava mist."

Í fyrru greinini um vanlukkuna var sagt, at dóttir Richard eftir at pápin var deyður, fekk navnið Rikka. Tað rætta er Richa. Hetta var so nær uppá pápanavnið, sum tað kundi vera.

Henda grein skal tískil vera til minnis um teir av okkara landsmonnum, sum mistu lívið við Hans Hedtoft.



*Richard Jacobsen sum stýrimaður*



*Foreldrini hjá Ólavi á teirra gullbrúdleypsdegi. Hans doyði í december 1999 og gjørdist 87 ár. Oluffa doyði í januar 2002 og gjørdist 88 ár*



*Beiggin Oddfríður fylgdi saman við mammuni Ólav til rutubátin úr Narsaq til Julianehåb*

## Gott ummæli um beiggjan

Oddfríður skrivar um beiggja sín:

"Ólavur var en dreng, der altid tænkte dybere over tingene, inden han tog en beslutning. Jeg kan huske, når vi om vinteren stod på ski sammen. For os andre var det kun en leg, men Ólavur, der altid arbejdede målrettet, skulle først lave beregninger i forhold til skihopbakken, så han kunne udføre de længste hop. Dette prægede Ólavur ved altid at udføre det, han foretog sig, bedst muligt.

Jeg husker min bror som en aktiv dreng med flere interesser, bl.a. musik, han spillede selv mundharpe, svømning, skøjter og skiløb. I skolen var han en dygtig elev, der nåede gode resultater. I fritiden læste han mange bøger. Han havde ambitioner for fremtiden, men mulighederne på Grønland var små. Han glædede sig derfor til at komme tilbage til Færøerne og begynde på sin uddannelse. Jeg er sikker på, at Ólavur ville have nået gode resultater i livet, hvis han havde fået muligheden.

Det var med blandede følelser og dybe tanker, jeg overtog den læreplads, der skulle have været Ólavur's start på hans karriere."

Hini systkini hjá Ólavi vóru: Sólbjørn f. 1935, Sondy f. 1939, Páll f. 1948 og Marino f. 1949.

Her kann vera nevnt, at javnaldrar og skúlafelagar hjá Ólavi vóru millum aðrar Jógvan Purkhús og Janus Jacobsen. Jógvan fór sjálvur í læru á bedingini, og hann minnist væl, at Ólavur skuldi koma. Tí var tað eisini á arbeiðsplássinum ein hvøkkur, at tað gekk sum tað gekk.

Tað sama var sjálvsagt hjá fastrini, sum skuldi hýsa Ólavi og annars hjá ættinni.